Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag (FNU)

Hoyringssvar til uppskot um løgtingslóg um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum

Tórshavn, 13. november 2025

Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag (FNU) vil staðiliga vísa á tað, sum kann gerast eitt av størstu og mest ógvusligu inntrivum í serstaka føroysku náttúruna nakrantíð. Ætlanirnar at leggja veg gjøgnum Sandoynna, Suðuroynna og Skúvoynna í samband við Suðuroyartunnilin hava ógvusligar avleiðingar fyri náttúruna og vit vilja leggja áherðslu á, at økini umfata eitt av okkara mest virðismiklu og sertøku náttúruøkjum – økið í Sandoynni, har ætlanin er at gera inntriv, umfatar bæði eitt stórt vátlendi, eitt tað største planturíkidømið í landinum, fleiri týðandi sílavøtn, tað økið í Føroyum við mest fjølbroytta fuglalívi og ta einastu burðardyggu grønmetisframleiðsluna í landinum. Harumframt ger verkætlanin inntriv í Skúvoynni, ið er eitt Ramsar-øki og leggur vegir tætt at vøtnum í Hvalba. Hesi seinastu metir FNU verða øki, mann skal vera serliga varin við, meðan fyrstnevnda økið í Sandoynni er eitt øki, mann undir ongum umstøðum kann nýta í samband við tunnilsverkætlanina.

FNU vil fyrst av øllum gera greitt, at felagsskapurin ikki tekur støðu til, um tunnilin eigur at verða bygdur ella ikki. Men felagið heitir á myndugleikar um at tryggja, at náttúruinntriv verða so avmarkað sum møguligt.

Ávirkaða náttúran

Uppskotið leggur upp til at gera stór inntriv í Djúpadali, millum vatna og omanfyri Skarvanes. Hetta er eitt øki, sum er nærum órørt, við friðarligum umhvørvi og ríkum fuglalívi. Nakað oman fyri Stóravatn liggur Lítlavatn, og økið Millum Vatna er eitt av fáu vátlendunum nær við bygdum, sum enn er órørt. Og tað eigur tað framhaldandi at vera.

Ein vegur við fleiri túsund bilum um dagin fer at órógva hesa friðarligu náttúru og økja um dálking við partikul- og mikroplasti. Fuglalívið, sum trívist væl í økinum, verður í stórum vanda. Hetta økið er ikki bara vakurt - tað er eitt náttúruøki av sera stórum týdningi, sum vit ikki eiga fleiri av í Føroyum, og sum vit tí eiga at varðveita. Eisini ger verkætlanin inntriv í Skúvoynni og í Suðuroynni, sum eiga at verða nógv betri lýst, áðrenn endaliga avgerð verður tikin um, hvørja linjuføring mann bjóðar út.

Umhvørvisstovan og altjóða praksis

Umhvørvisstovan hevur alment úttalað, at økini kring Stóravatn, Lítlavatn og Sandafløttin sannlíkt eiga og fara at verða vard av náttúruverndarlógini. FNU vil staðiliga vísa á, at inntriv, sum eru lýst í lógaruppskotinum, fara at vera í stríð náttúruverndarlógina, um – sum sannlíkt er – avgerð verður tikin um at verja hesi øki.

Altjóða praksis er, at sentralur infrastruktur ikki skal leggjast í vard øki. Í ES og øðrum londum verða stórur íløgur settar í at varðveita og endurvinna vátlendi og friðað øki, og harumframt verða vegir og tunlar lagdir uttanfyri serlig náttúruøki (IUCN Guidelines, 2021; European Commission, 2020; OECD, 2019; Ramsar Convention, 1971). Hetta vísir á týdningin av at virða náttúruna.

Alternativ loysn

FNU metir seg ikki vera ført fyri at velja farleið, men mælir tó staðiliga til, at tunnilsmunnin til Suðuroyartunnilin undir ongum umstøðum verður staðsettur nærhendis Lítla- og Stóravatn. Hetta tryggjar, at náttúran kring Stóravatn, Lítlavatn og Sandafløttin verður nærum órørd. Vit vilja leggja

áherðslu á, at við eini linjuføring, sum ávirkar stórar partar av Sandsbygd og inn í Djúpadal, so ger mann stór og óneyðug inntriv í eitt ógvuliga týðandi náttúruøki í Føroyum, sum náttúrúfólk, fuglaáhugað, plantuáhugað, sílaáhugað og grønmetisáhugað hava sum sín náttúrudepil.

Margfeldið og góða jørðin í oynni ger oynna til eitt heilt serligt stað fyri granskarnar, náttúruserfrøðingar og er ein depil fyri náttúruáhugaði og fyri fleiri ymiskar verkætlanir innanfyri náttúru og burðardygd. Nógv gott er sprottið úr hesi enn órørdu og serstøku náttúru – tað eiga vit ikki at gera óneyðug inntriv í, um tað á nakran hátt slepst undan.

Samandráttur og staðilig áheitan

- FNU mótmælir harðliga ætlanum um vegaføring gjøgnum Sandoynna, sum eru ógvuslig fyri náttúru, vátlendi og grønmetisframleiðslu.
- Felagið tekur ikki støðu til, um tunnilin eigur at verða bygdur, men krevur, at náttúruinntriv verða minimal.
- FNU mælir til at kanna alternativa linjuføring norðan fyri Sands bygd, sum varðveita náttúru og lívmargfeldi.
- FNU heitir á myndugleikar um at gera neyðugu kanningarnar, at ikki skunda málið gjøgnum fyrrenn tað er lýst gjølla og búgvið til støðutakan.

Við hesum fyrilitum kunnu Føroyar varðveita eitt av sínum virðismiklastu náttúruøkjum, bæði til gleði fyri núverandi og komandi ættarlið – uttan at tað oyðileggur møguleikan fyri einum Suðuroyartunli.

Keldur

1. *Ramsar Convention on Wetlands, 1971, revidert 2018: https://www.ramsar.org/*
2. *European Environment Agency, European Wetlands: Status and Threats, 2020: https://www.eea.europa.eu/themes/biodiversity/wetlands*
3. *IUCN Guidelines for Infrastructure Development in Protected Areas, 2021: https://www.iucn.org/theme/protected-areas/resources/guidelines*
4. *European Commission, Guidance on Environmental Impact Assessment (EIA) for Infrastructure Projects, 2020*
5. *OECD Environmental Policy Paper: Infrastructure and Biodiversity: Avoiding Impacts on Protected Areas, 2019: https://www.oecd.org/environment/resources/infrastructure-biodiversity.htm*
6. *Kibblewhite, M.G., et al., 2018, Environmental Pollution, 233, 1–12*
7. *Muthu, S.S., et al., 2021, Environmental Science and Pollution Research, 28, 26000–26015*
8. *Petit, S., et al., 2011, Journal of Environmental Management, 92(3), 732–742*
9. *Phillips, T., et al., 2021, Conservation Science and Practice, 3(9), e415*